HØLI TIL LEIGU
Ljóst, hugnaligt høli til leigu, uml. 100 kvm, væl egnað til skrivstovu o.l. 5 min. frá miðbýnum, góð parkeringsviðurskifti.
Tlf. 17100, eftir kl. 17

ÍBÚÐ Á AMAGER
60 kvm, til leigu frá 1. aug. Í góðum standi, 5 min. frá Kastrup, nær strond, barnavinarligt umhvørvi. Kostnaður 3.500 kr. um mðr. v/ hita.
Tlf. 17100, kl. 17–21, ella Tlf. 031 59 35 68

YNSKIST
Søkt verður eftir íbúð skamt frá miðbýnum í Havn frá 1. sept. Best um vaskimaskina er tøk. Kostnaður við ljósi og hita í mesta lagi við 1 kamari, 2.000 kr., 2 kømur, 2.500 kr.
Tlf. 12715

SUMMARHÚS
í Leynum við øllum hentleikum, 8 soviplássum og sjónvarpi, til leigu.
Tlf. 14699

ÍBÚÐ YNSKIST
Friðarligt par søkir íbúð í Havn ella nærhendis.
Tlf. 19114 - 24115

ÍBÚÐ Í KEYPMANNAHAVN
Hvítur spísikøkur, stova v/ altan, arbeiðsrúm, soviverilsi, gott og friðarligt umhvørvi, 2 min. til Tagensvej l. 10, góð bilparkering og vaskarí í bygningunum, til leigu beinanvegin um ynskist. Depositum krevst.
Tl. 14319

GÓÐ ÍBÚÐ
til leigu til ferðafólk.
Tlf. 75142 - 75085

IBÚÐ YNSKIST
Ungt par søkir íbúð í vesturbýnum ella miðbýnum frá 15. aug. Roykja ikki. Max. 2.500 kr. v/ ljósi og hita.
Tlf. 71094

HÚS YNSKJAST
Nýggjari hús ynskjast til framleigu til tvey vaksin og tvey børn, helst í Hoyvík. Húsaleiga uml. 4–4.500 kr. um mðr. Kontrakt. Set teg í samband við Kenneth Olsen
Tlf. 11480, Mjørkadalur

ÍBÚÐ SØKIST
Ungt, edrúlligt par søkir íbúð miðskeiðis í Tórshavn. Leiga uml. 2.500–2.500 kr. v/ ljósi og hita.
Tlf. 19174

ÍBÚÐ Í VANLØSE
Stór 1 rúms íbúð við alkova, 2 altanum, til framleigu í tvey ár. Prisur 3.000 kr. v/ hita.
Tlf. 12433

HÚS Í KOLLAFIRÐI
til leigu frá 1. aug. fyri stytri ella longri tið.
Tlf. 075 15 36 19

ÍBÚÐ YNSKIST
í Havn skjótast gjørligt til lesandi. Skal hava 3–4 kømur, køk/stovu og baðiverilsi.
Tlf. 24559, kl. 8–17
Tlf. 24216, eftir kl. 17

HÚS Í SALTNESI
til leigu.
Tlf. 48641

LEIGA BÍLIGA!
Stór fritíðarhús í Leynum við øllum hentleikum. Húsini standa nær sandinum.
Tlf. 21565

TIL LEIGU
Íbúð á Nørrebro, Keypmannahavn, til leigu frá aug.
Tlf. 11655

FERÐIST Í NORÐOYGGJUM
Góð og stór fritíðarhús í Kunoy bíliga til leigu. Allir hentleikar. Bilin til dyrnar.
Tlf. 56247

VERILSI
v/ atgongd til køk og bað til leigu.
Tlf. 13560

YNSKIST
Hús ella stór íbúð ynskist til leigu frá 15. aug. fyri max. 3.500 kr. v/ ljósi og hita. Skal helst hava atgongd til vaskirúm.
Tlf. 19428

GJÓGV – VIKUSKIFTI/ FERIU
Hevur tú hug at uppliva ta vøkru náttúruna við Gjógv? Vit leiga út eitt sera hugnaligt fritíðarhús við vanligum hentleikum fyri 200 kr. fyri samdøgurið.
Tlf. 23138, 13423, 16505, 84705

MØBLERAÐ KAMAR
til leigu til edrúiligt fólk beinanvegin.
Tlf. 12274

ÍBÚÐ Í RUNAVÍK
Vælhildin íbúð til leigu í Runavík. Klárt at flyta inn 1. aug.
Tlf. 47024

ÍBÚÐ
á Mylnugøtu 21 í Klaksvík til leigu frá 1. aug.
Tlf. 55435

SØKT VERÐUR
eftir íbúð á Norðasta Horni skjótast gjørligt. Max. 2.500 kr. um mðr. v/ ljósi og hita.
Tlf. 16706

KAMAR SØKIST
Ungur, lesandi drongur søkir kamar í Havn. Max. 1.500 kr. um mðr.
Tlf. 73238, best eftir kl. 20

HÚS Á GLYVRUM
til leigu.
Tlf. 47572

ÍBÚÐ SØKIST
Ung, lesandi genta søkir íbúð í Havn. Max. 1.800 kr. um mðr.
Tlf. 27061

VERILSI
á Heygsmannavegi 5 til leigu til edrúiligt fólk. Allir hentleikar.
Tlf. 32185

HALDIÐ FRÍ Í VÁGI
Ogur hava fyrsta floks vallaraheim við øllum hentleikum.
Skótahúsið, tlf. 73060

HÚS Í VESTMANNA
bíliga til leigu í stytri ella longri tið.
Tlf. 13488

HÚS Í NORÐRAGØTU
til leigu.
Tlf. 41063

ÍBÚÐ Í KEYPMANNAH.
ynskist til leigu frá 1. aug. og eitt ár fram.
Tlf. 11149

KENNIR TÚ LAND TÍTT?
Njótið góðar dagar í hugnaligum 60 kvm. stórum fritíðarhúsum í Mikladali við øllum nútímans hentleikum og í náttúruvøkrum bygdarligum umhvørvi. Meira at vita á
Tlf. 55267 ella 56939

FJALSGARÐUR
Hevur tú hug at venda gráa gerandisdegnum bakið? Kundi tú hugsa tær nakrar dagar í óspiltum umhvørvi við góðum møguleikum at fara eitt nú á seiðaberg og gongutúr í hagan, og annars njóta »lívið á bygd«? So er Fjalsgarður í Oyndarfirði staðið, tú hugsar um!
Tlf. 44522 - fax. 44570

HÚS Í VÁGI
til leigu frá 1. aug.
Tlf. 73479

»FOSSSTOVA«
Fritíðarús í Mikladali! Bingt innivist fæst í góðum og rúmligum húsum. Húsini eru væl egnað bæði til einstaklingar og bólkar.
Tlf. 13660 ella 15339

HÚS YNSKJAST
Rúmligt hús í Havn ynskist til leigu fyri august mánað. Max. kr. 4.000 v/ el og olju.
Tlf. 14807 / 84533

HÚS Í KLAKSVÍK
til leigu.
Tlf. 56954

FRÍTÍÐARHÚS VIÐ GJÓGV
Njótið eitt vikuskifti ella meira við Gjógv í vøkrum og óspiltum umhvørvi í gomlum, hugnaligum húsum við øllum nútímans hentleikum, fyri ein sámuligan kostnað.
Tlf. 21060

KAMAR
v/ atgongd til køk, bað/wc, felagsrúm og myntttelefon, til leigu í Símunargøtu 7 til skúlanæming. 1.000 kr. um mðr.
Tlf. 13897

Bøkur

FHS-BØKUR
til sølu fyri hálvan pris.
Tlf. 61126

ALLAR FHS-BØKUR
árg. 94/95, til sølu fyri 1.500 kr.
Tlf. 15773

ALLAR FHS-BØKUR
nýttar 1994/95, til sølu fyri 1.100 kr.
Tlf. 33130, Thomina

Dýr

KETTLINGUR
Fittur, væl vandur kettlingur fæst við at ringja
Tlf. 16736

10 DUNNUUNGAR
ynskjast til keyps fyri uml. 15 kr. stk.
Tlf. 13156, Lisbeth

TIL SØLU
Vatnskjaldbøka av slagnum bløðskjoldsskjaldbøka, uml. 8 cm stór, til sølu fyri 65 kr. 38 ltr. akvarium, 250 kr. Ongantið brúkt.
Tlf. 51149, kl. 17–20

UNDULATUR
Ein undulata hon til sølu fyri 250 kr.
Tlf. 51149, kl. 17–20

KETTLINGUR
11 vikur gamal kettlingur verður latin djóravinum.
Tlf. 10190 ella 13624

UNDULÁTAR
Sera litfagrir undulátar til sølu.
Tlf. 47547

YNSKIST
Norsk ryssa ynskist til keyps.
Tlf. 41121

KETTA HORVIN
17. juni á Kósini. Hon er grá v/ ljósabrúnum blettum og hvít undir búkinum. Veit nakar um hana, vinarliga sig frá á
Tlf. 57898

SEYÐAHUNDA-HVØLPUR
til sølu.
Tlf. 16040

KANARIUFUGLAR
Kanariufugla par og ein einligur kanariuhannur, ið syngur vakurt, til sølu.
Tlf. 51149, kl. 17–20

KETTLINGUR
Reinligur, fittur og spakur kettlingur fæst við at koma eftir honum.
Tlf. 18094

KETTA BURTURBLIVIN
í J. H. Schrøtersgøtu 20. Kettan er hvít, ljósabrún og svørt flekkut.
Tlf. 21527

GÆS TIL SØLU
Nakrar gæs til sølu fyri 250 kr. stk.
Tlf. 48001

KETTLINGUR
Vakur, fleirlittur kettlingur, uml. 12 vikur gamal, verður latin djóravini.
Tlf. 73465

HØSNARHÚS
Lítið høsnarhús við fimm hønum til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 47735

FITTIR HUNDAHVØLPAR
Tveir sera fittir og vakrir hundahvølpar fáast við at koma eftir teimum. Mamman er lítil, reinlig og sera blið. Bert til djóravinir.
Tlf. 42141

KALKUN UNGAR
til sølu.
Tlf. 10429

KETTA FUNNIN
Ung reyð og gul ketta, hvít á bringuni og undir búkinum, hvítar labbar, upptikin í miðbýnum leygardagin. Eigarin biðist ringja
Tlf. 11912

Húsarhaldstól

TIL SØLU
Hálvautomatisk vaskimaskina, trumla og kar úr rustfrium stáli, trumlan kann lættliga takast úr (nátar), kókar skjótt. Kr. 300 ella hægsta boð.
Tlf. 12451

HYGG HER!
Nýggj, heilautomatisk vaskimaskina til sølu fyri 4.500 kr.
Tlf. 19587

TIL SØLU
Kølireol til sølubúð og ísboks við glasloki til sølu fyri 1.500 kr.
Tlf. 61046

BRÚKT KØLISKÁP
bíliga til sølu.
Tlf. 11050

CANDY 109X
vaskimaskina til sølu.
Tlf. 18915, kl. 12–13 og eftir kl. 16

Innbúgv

YNSKIST
Um onkur hevur áhuga fyri einari einkultari sovisofu við fýra pútum og plásss fyri seingjarklæðum, so ring og frætt nærri.
Tlf. 73189

HORNASOFA
Sum nýggj, til sølu fyri 3.000 kr. Nýprísur 8.000 kr.
Tlf. 10473

TIL SØLU
Vínreyð velour hornasofa og massivt furu sofaborð til sølu fyri 2.500 kr.
Tlf. 47712

TIL SØLU
Furu dupultsong, 700 kr. Madrassir, 150 kr. Sofaborð v/ koparplátu, 400 kr. Teak sofaborð, 100 kr. Divan, 100 kr. Tvey náttborð + sengur, 300 kr. Gólvteppi, 500 kr. Dýnur, 100 kr.
Tlf. 11686

TIL SØLU
Brúkt, massiv furu briks til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 14740

TIL SØLU
Skriviborð úr massivum træi, 600 kr. Sovisofa úr massivum træði, kann gerast dupult, 800 kr. Hvítlakkerað song við springmadrassu, sum nýggj, 1.500 kr.
Tlf. 14157

HARMONIKUHURÐ
brúkt, 1x2 m, til sølu.
Tlf. 13762

VEGNA PLÁSSTROT
selja vit eina sera vakra, brúna leðurhornasofu fyri einans 5.000 kr. Nýprísur 16.000 kr.
Tlf. 13399, Conny

HORNABONKUR
úr furutræi, std. 178x138, kann vendast, til sølu fyri 1.800 kr.
Tlf. 16596

HILLASYSTEM
við tilhoyrandi skápum og skuffum, til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 44015

CLUB 8
Briks við tveimum skuffum og eitt skrivaraborð + síðuhillar til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 32705

TIL SØLU
Song, 70x200, við botni og madrassu, 400 kr. Briks, 70x200, + eitt borð, tveir stólar, 600 kr.
Tlf. 19428

TIL SØLU
Hvítt skrivaraborð, 155x75, hvítt telduborð, 60x60, og reyður stólur til sølu fyri 1.200 kr.
Tlf. 13958

TIL SØLU
3 pers. sofa + tveir stólar, lenistólur og standlampa bíliga til sølu.
Tlf. 55426 ella 49864

KOYGGJUSONG
ynskist til keyps.
Tlf. 19403

TIL SØLU
Køksborð + fýra stólar, 3+2 sofur, sofaborð, tvær smáar, hvítar reolir, song við madrassu, el-ketil, kaffimaskina og aðrar búnyttir.
Tlf. 57911

BRENNIOVNUR
til sølu.
Tlf. 17305

VATNSONG
180x200, hvít, 100% dempað, til sølu.
Tlf. 48672

TIL SØLU
Væl viðfarin sovisofavið ullintum toyi, bíliga til sølu.
Tlf. 43327

Pleggj

TIL SØLU
Hondbundin damutroyggja til før. búnan, std. 44–46.
Tlf. 10634

TIL SØLU
Nýggj, hondbundin gentu troyggja til før. búnan, std. 8–9 ár.
Tlf. 19328

BRÚÐARKJÓLI
std. 36, til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 41661

NÝGGJ KNAPPA-TROYGGJA
til sølu fyri 2.000 kr. Stødd: miðal. Svørt.
Tlf. 61476

YNSKIST
Brúktur, før. búni til gentu, std. 10–12 ár, ynskist til keyps.
Tlf. 15784, eftir kl. 16

DREINGJATROYGGJA
til før. búnan, 5–6 ár, nýggj við knøppum, til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 73492

TIL SØLU
Kvinnutroyggja til før. búnan og ein troyggja til drong, 6–7 ár.
Tlf. 12156

TIL SØLU
Vøkur, hondbundin troyggja til før. búnan, 10–12 ár, til sølu fyri 550 kr.
Tlf. 14724

BRÚKT KLÆÐI
Góð, brúkt klæði til børn og vaksin fáast við at koma eftir teimum.
Tlf. 12003,
hittist frá kl. 13–17

BRÚÐARKJÓLI
Nýmótans brúðarkjóli, std 14 (36–38), handskar og hattur fylgja við, til sølu fyri 2.500 kr.
Tlf. 41190

TIL SØLU
Ein Havnar Fimleikafelag dragt, std. 150, til sølu fyri 200 kr.
Tlf. 19268

Súkklur

GENTUSUKKLA
til 12 ár, bíliga til sølu.
Tlf. 56757

TIL SØLU
Tvey 28" hjól v/ dekkum, trý gear, saðil og róður til sølu fyri 600 kr. Óbrúkt.
Tlf. 47397

FJALLASÚKKLA
Nýggj 24" fjallasúkkla til sølu fyri 1.900 kr.
Tlf. 49191

TIL SØLU
Væl viðfarin sterk BMX-súkkla við hond- og fótbremsum, std. 5–7 ár, til sølu fyri 600 kr.
Tlf. 11243